# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FATEKST@MAIL.DK
TLF 341800

*– Fyrr var illa, um krokodillurnar ikki fáa líkið av Steve Irwin*

*vinmaður hansara*

## STUTT SAGT

### Stórur vandi fyri yvirgangi

Í India stúra myndugleikarnir fyri, at yvirgangsmenn fara at gera um seg í næstum, og sambært forsætisráðharranum, Manmohan Singh, er tað ikki óhugsandi, at yvirgangsmeninir fara at søkja at onkrum av landsins kjarnorkuverkum.

Singh sigur, at trygdartænastan hevur fingið upplýsingar, sum kundu bent á, at yvirgangsmenn fyrireika seg til atsóknir, og at umframt kjarnorkuverkini verða høvuðsstaðurin New Dehli og fíggjarmiðdepilin Mumbai mett sum tey fremstu álopsmálini. Løgreglan hevur tikið fleiri fólk, sum verða hildin at hava tilknýti til yvirgang, men tað merkir avgjørt ikki, at vandin er av, sigur forsætisráðharrin.

Í gjár frættist eisini, at onkur hevur hótt við at beina fyri indiska forsetanum, A. P. J. Abdul Khalai. Mánakvøldið bleiv flogfarið hjá forsetanum kannað bæði væl og leingi á flogvøllinum í býnum Chenmai, tí tað ljóðaði, at onkur hevði fjalt spreingievni í flogfarinum. Har var kortini einki at finna.

### Hvør drap abba?

Guido Mussolini, sum er abbasonur fyrrverandi italska einaræðisharran Benito Mussolini, vil nú hava at vita, hvør gav boð um at beina fyri abba sínum.

Benito Mussolini og unnusta hansara, Clara Petacchi, vórðu tikin í Norðuritalia tann 26. mai í 1945, og tveir dagar seinni vórðu tey avrættað í Milano. Avrættingin var almenn, men líka síðani kríggið hava italiumenn spurt, hvat veruliga hendi teir dagarnar.

Tað vil Guido Mussolini eisini hava at vita. Sambært søguni var tað heryvirmaðurin Walter Audisio, sum gav boðini um at beina fyri einaræðisharranum, men sakførarin hjá Guido Mussolini sigur, at navnið á Audisio kom ikki fram fyrr enn tvey ár eftir kríggið. Hann ivast tí ikki í, at tað var onkur annar, sum gav boðini.

– Eg vil bara hava at vita, hvør beindi fyri abba mínum, og tað er væl ikki annað enn rímiligt, sigur tann 69 ára gamli Guido Mussolini við italska útvarpið.

### Sluppu ikki á land



Við jøvnum millumbilum vitja donsk sjóverjuskip ta lítlu oynna Hans Ø vestan fyri Grønland fyri at vísa, at danir meta seg hava ræðisrættin á oynni. Men hesaferð miseydnaðist tað tí lítla sjóverjuskipinum „Agpa" at sleppa til oynna, tí har var so nógvur ísur.

Sambært danska útvarpinum noyddist „Agpa" at venda aftur, tá skipið var 11 fjórðingar frá oynni. Manningin tók nakrar myndir og setti síðani kós suðuraftur, sigur útvarpið.

Danmark og Kanada eru ósamd um, hvørt teirra skal hava ræðisrættin á Hans Ø. Í 1973 skuldu londini áseta mark millum Kanada og Grønland, men tey kundu ikki semjast um, hvørt teirra eigur ta lítlu oynna. Málið er týdningarmikið, tí tað kann henda, at olja er at finna undir havbotninum á hesum leiðum.

# Malaria kann koma til Evropa



*Hesin verður kanska vanligur í Evropa og Norðuramerika í framtíðini*

**Veðurlagsbroytingarnar við veksandi hita í Evropa kunnu hava við sær, at tropiskar sjúkur so sum malaria kunnu koma norðureftir, siga granskarar.**

Í summar vórðu fleiri fólk, sum vóru farin at svimja í Eystrasalti, smittað við kolera, og kolerabakteriur, sum vit vanliga seta í samband við heitari havleiðir, vórðu funnar við Bornholm og svensku oynna Gotland.

Nú siga bretskir granskarar, at tann veksandi hitin í Evropa kann hava við sær, at fleiri tropiskar sjúkur kunnu koma hendanvegin, og teir vilja hava myndugleikarnar at halda eitt vakið eyga við gongdini.

Paul Hunter, profrssari, hevur saman við øðrum granskarum skrivað eina frágreiðing um, hví vit kunnu vænta ávísar tropiskar sjúkur til Evropa og Norðuramerika. Sjálvur stúrir hann mest fyri malaria, sum á hvørjum ári krevur fleiri milliónir mannalív í Afrika, og hann heldur ikki, at heilsumyndugleikarnir leggja nóg stóran dent á tað, sum er í ferð við at henda.

– Vit hava longu fleiri tekin um, at ávísar sjúkur eru komnar til Evropa orsakað av veðurlagsbroytingunum, sigur Paul Hunter við BBC.

Kolerabakterian vibrio vilnificus, sum varð funnin í Danmark og Svøríki í summar, er ein av teimum bakteriunum, sum sambært granskarunum er komin norðureftir við hitanum. Bakterian veksur í heitari sjógvi so sum í Meksikoflógvanum, men er nú komin norður í Eystrasalt. Havbakterian er í ætt við ta vandamiklu kolerabakteriuna. Hon verður kortini ikki hildin at vera vandamikil fyri frísk fólk, men í summar kostaði hon einum 62 ára gomlum dana lívið.

Í Italia vórðu umleið 100 fólk løgd inn á sjúkrahús í summar, eftir at tey vóru komin í samband við ta tropisku alguna ostreopsis ovata, sum elvir til millum annað trupulleikar við andadráttinum og fepur. Paul Hunter ivast ikki í, at tann veksandi hitin hevur givið teirri tropisku alguni nýggjar vkstrarleiðir.

Paul Hunter sigur við BBC, at tað er ikki bara tann veksandi hitin um summarið, sum økir vanda fyri, at vit fáa tropiskar sjúkur norðureftir. Tað hevur minst líka nógvan týdning, at veturin á okkara

# Loksins fáa krokodillurnar hann

**Líkið av „The Crocodile Hunter" skal latast krokodillunum**

– Hann hevur argað krokodillurnar alt sítt lív, so tað er ikki annað enn rímiligt, at tær fáa hann nú, sigur ein vinmaður Steve Irwin við heimasíðuna Brainsmap.

Tað er ikki greitt, um líkið av „The Crocodile Hunter" veruliga verður latið krokodillunum í djóragarðinum Beerwatch, men sambært Brainsmap hava tey avvarðandi hjá Steve Irwin havnað einum tilboði frá avstralsku stjórnini um at geva tí kenda djóravininum eina almenna jarðarferð.

Tað var politiski leiðarin í Queensland, Peter Beattie, sum fyrstur kom við hugskotinum um eina almenna jarðarferð, og seinni segði avstralski forsætisráðharrin, John Howard, at hann tók undir við, at Steve Irwin verður jarðaður fyri almenna rokning.

Men sambært Brainsmap hevur einkjan havnað tilboðnum.